| Útbúgvingarprofilur: |
|---|
| ***Sosialvísindi og Samfelagsplanlegging M.S.Sc.*** |

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Søgu- og Samfelagsvísindaligar masterútbúgvingar (Masterlæra). |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og Samfelagsdeildin, Tórshavn, Føroyar. |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Mentamálaráðið |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | 2015 - 2017. |
| STIG | Master “Second Cycle” sambært EQF - LLL og QF – EHEA. |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Innan tær tríggjar útbúgvingarnar handan masterlæruskipana, er endamálið:<br>✓ At víðka munandi um ta fakligu vitanina, arbeiðsevni og sjálvstøðugt virksemi hjá studentinum við støði í teimum førleikum, ið bachelorútbúgvingin hevur givið.<br>✓ Víðkaðar førleikar at nýta teori og metodu innan tey fakøki studenturin er atknýttur.<br>✓ Víðkaðar førleikar til sjálvstøðugt at gera og nágreiniliga kanna problemgrundaðar arbeiðstilgongdir og harvið røkka fakligari dýpd og sjálvstøðugum avriki.<br>✓ At geva studentinum førleikar at fara undir eina granskingarútbúgving (Ph.d).<br>✓ Við støði í viðkomandi fakøki, teimum førleikum, ið hetta gevur, sjálvstøðugt og við tvørfakligum grundarlagi at røkja serligar og torgreiddar arbeiðsuppgávur í tí privata vinnulívinum, í tí almenna geiranum ella í almannagagnligum viðurskiftum. |

| B | | EYÐKENNI |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Masterlæruskipanin umfatar fakøkið:<br>✓ *Sosialvísindi og samfelagsplanlegging, ið* er tað lestrarøki sum umfatar menniskjans samanspæl við samfelagsins strukturar og institutiónir, og hvussu intentionel samfelagslig menning menning skapast, hetta grundað í felags avgerðum og virðum.<br><br>Masterlæruskeiðið er bygt upp eftir fylgjandi yvirskipaða strukturi:<br>✓ 1. semestur, ið er víðkað innføring í teori og metodu innan fakøkini (15 ECTS) og master-læru projekt (15 ECTS).<br>✓ 2. semestur, ið er uppihald á útlendskum universiteti, har tann lesandi nemur sær serkunnleika innan ávís(t) evni.<br>✓ 3. semestur, ið kallast ‘phronetikum’ (praksislæra), er skipað sum samanrenning millum praktikkuppihald og masterlæru-projekt.<br>✓ 4. semester, ið er arbeiðið við master-læru serritgerðini (spesiali).<br><br>Reglugerð, formligir karmar nærri lýsing av innihaldinum í masterlæruni, t.e. fakligt innihald, læruformar, kompetansumál og praktiska gjøgnumførslu annars, er lýst í “Námsætlan fyri Masterlæru” og “Vegleiðing til Masterlæru” við Fróðskaparsetur Føroya. |
| 2 | ALMENNUR DENTUR | Masterlæruskipanin leggur almenna áherðslu á at skipa granskingargrundaðar, tvørvísindaligar og praksisrættaðar útbúgvingar, t.e. útbúgvingar við áherðslu á sínamillum ávirkan millum brúk av vísindaligum teorium, metodum og persónligar og kollektivar læringstilgongdir (problemorientering, praksislæru, v.m). |
| 3 | KÓS | Í masterlæruskipanini er kósin teoretiskt og metodiskt innlit grundað á fleiri søgu- og samfelagsvísindaligar traditiónir við áherðslu á interdisiplinaritet, problemorientering, metodologiskan opinleika og kritiska støðutakan. Ì masterlæruskipanini er kósin samstundis individuellar læruætlanir, har tann lesandi, umframt at velja sær eitt fakøki, eisini velur ein ætlan fyri hvat |

| | | |
|---|---|---|
| | | praksisfelt ein serliga ynskir at leggja seg eftir. |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Masterlæra hevur sum serligt eyðkenni, bæði at skapa eitt felags fakligt støði, supplerað við møguleikanum hjá teim lesandi at skapa sær ein egnan fakligan profil. Tí er partur av lestrinum (2. semestur) at roknað sum uppihald á lestrarstovni í øðrum landi, har dentur verður lagdur á, at tann lesandi tekur útvald fak innan tað praksisfelt viðkomandi ynskir at leggja doyin á.<br><br>Roknast má eisini við, at partar av undirvísingini og uppgávuskrivingini fara fram á øðrum máli enn føroyskum (t.e. skandinaviskum/enskum). |

| C | STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Útbúgvingin gevur førleikar til leiðandi størv innan privata, almenna og sivilsamfelags sektorarnar, lokalt og altjóða. Tann spesialisering sum liggur i meistaralærutilgongdini gevur serliga góðar starvsmøguleikar innan tað ávísa felt, ið tann lesandi velur sum sítt høvuðsøki. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | Útbúgvingin kvalifiserar til víðari lestur á ph.d. stigi (Third Cycle Programmes). |

| D | ÚTBÚGVINGARHÁTTUR | |
|---|---|---|
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Masterlæra er serlig 2 ára masterskipan [120 ECTS], ið byggir á interdisiplinaritet, har læring sum virkin praksisfelagsskapur hevur serligan týdning. Dentur verður tí lagdur á interaktiva læring gjøgnum problemgrundað projektarbeiði, kollokvium, temaseminar og workshops og aðrar formar fyri felags læruaktivitetir. Masterlæra miðar samstundis eftir at geva tí einkulta studentinum egnan yrkisrættaðan profil. |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Skrivligar uppgávur við ella uttan munnligari verju. Munnligar royndir grundaðar á temaseminar, workshops o.l. Serritgerðin verður vard munnliga. |

| E | ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR |
|---|---|
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | **Akademiskt arbeiðslag.** Dugir problematisering, viðgerð og analysu innan egið fakøki, og dugir at skilja vísindaliga teori, metodur og teknikkir, ið nýttir verða innan viðkomandi fakøki.<br>**Persónligir eginleikar.** Megnar sjálvstøðuga, kritiska støðutakan og leiðslu innan sítt virkisøki.<br>**Sjálvstøðugt arbeiðslag.** Dugir at starvast á høgum fakligum støði, hetta við atliti til evnis-, resursi- og tíðaravmarking.<br>**Førleikar** til skrivligt og munnligt samskifti í hóskandi samsvari við samskiftisstøðuna.<br>**Førleikar** á høgum stigi at nýta søgu- og samfelagsvísindaliga vitan í verki. |
| 2 | FAKLIGIR FØRLEIKAR |
| | **Yrkisgrundarlag**. Dugir at vísa breiða og høgt skikkaða vitan um týðandi tættir innan sítt ávísa fakøki, ið byggir á viðurkenda vísindaligu gransking og fakligheit.<br>**Trupulleikaloysn**. Dugir at átaka sær granskingarlíknandi og granskingargrundaðar uppgávur, harundir serliga at arbeiða problemgrundað og tvørvísindaligt á einum høgum fakligum stigi.<br>**Samskiftiseginleikar**. Dugir at lýsa mál úr fleiri sjónarhornum, at greina hesi og føra fram týðandi vitan innan egið fakøki og fakevni. Evnar at kjakast við fakfelagar um hesi viðurskifti, harafturat við onnur, ið ikki eru serkøn á økinum og leikfólk.<br>**Sjálvstøða**. Evnar sjálvstøðugt at taka á seg uppgávur á høgum stigi, men samstundis hegni til at vera partur av einum arbeiðsbólki umframt at leiða slíkar arbeiðsbólkar.<br>**Leiðsla og menning**. Megnar at taka á seg greinandi arbeiðsuppgávur vegna privatar, almennar og sjálvbodnar fyritøkur, undir hesum at bjóða fram væl grundað uppskot at greiða praktiskar avbjóðingar. |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUM FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | Við lokna útbúgving er tann nýggi master førur fyri:<br>✓ at meta um teoretisku og metodisku menningina innan viðkomandi fakøki.<br>✓ analysera og meta um kjarnuhugtøk innan viðkomandi fakøki.<br>✓ kjakast um menning, teori og perspektiv innan viðkomandi fakøki.<br>✓ Meta um, innan hvørji umráði viðkomandi fakøki kann nýtast, megna at identifisera viðkomandi perspektiv, greiða frá hesum og teirra møguleikar og nýtslu í analysu og menning av økinum.<br>✓ At relatera og perspektivera fakliga grundaði hugtøk og teori í mun til hvønn annan og til útvald evni, og greina orsøkir til støður, mótsetningar og samanhangir í mun til viðkomandi fakøki.<br>✓ At starvast í einum fakligum umhvørvi, t.e. megnar at seta gongd á kjak, fáa fram mótsetningar, greiða og greina við støði í einum kommunikativum rationaliteti.<br>✓ At planleggja, leiða og gjøgnumføra projektir og menningararbeiði innan fakøki<br>✓ at framleiða vísindaliga grundað tilfar, hetta í einum praksisfelagsskapi og sjálvstøðugt.<br>✓ Sjálvstøðugt at velja út faklitteratur og grundað val av øðrum tilfari, hetta í mun til eitt nú problem ella tema.<br>✓ Sjálvstøðugt at vísa evni til at velja út og brúka metodisk høvuðsreiðskap innan fakøkið.<br>✓ Sjálvstøðugt evna at formidla teori, metodu, analysu og úrslit á ein vísindaligan hátt.<br>✓ Sjálvstøðugt evna at viðgera relevantar teoretiskar keldur, hetta við atliti til a greina veruleikan og hvussu vit á hesum grundarlagi kom fram til ásannan av veruleikanum.<br>✓ At lýsa og analysera, hvussu úrvaldar metodur og teknikkir gera tað møguligt at finna fram til nýggja ásannan av veruleikanum.<br>✓ At formidla ásannan við støði í vísindateorei<br>✓ At fremja teoretiska, metodiska og empiriska vitan í praksis, hetta í greining, meting og analysu innan tey starsvøki, ið útbúgvingin miðar ímóti.<br><br>Masterritgerðin skal dokumentera/ávísa:<br>✓ Eginleikar at problematisera, kontekstualisera og týðiliga greiða frá relevansinum av valda tema, tilgongd og problematikki.<br>✓ Evni at identifisera ymiskar tilgongdir til valda problematikkin, og út frá hesum taka relevant og kvalifiseraði val av teori og metodu, hetta við støði í at megna kritiska og sjálvstøðuga analysu innan valda fakøkið.<br>✓ Gjøgnumførslu av samanhangandi og kontinuerligari analysu av relevantum problematikki, t.e. teoretiskt, metodiskt, reiðskapsfakliga og tekniskt.<br>✓ Forstáilsi fyri diversiteti í mun til tilgongdir til eitt problemfelt og reflektera kritiskt hesum viðvíkjandi.<br>✓ Kritiska reflektión yvir egin granskingarúrslit, hetta í mun til hvussu hesi kunnu stuðla undir og kvalifisera tað praksisfelt (tema), ið ein arbeiðir innanfyri. |